

## Lego framvegis væl umtókt

Tað gongur væl fyri fyritøkuni Lego í Danmark. Yvirskotið í fjør var slakar tríggjar milliardir krónur. Umsetningurin var 11,6 milliardir móti 9,5 millardum í 2008. Lego hevur 4,8 prosent av alheims leikuhandlinum. Fyri nøkrum árum síðan stóð einki til hjá Lego, men nú kann leiðslan loyva sær at fegnast um gongdina.

# Grafisk list av himli og úr helviti

**Við orku og íblástri av himli og úr helviti letur nýggj framsýning upp við grafiskari list í reyðum og svørtum**

LIST

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Á Grækarismessu í ár verða framsýningarhølini hjá Steinprenti á Skálatrøð skrýdd í júst somu litum sum fuglurin, ið fær serligan ans henda dag. Men tjaldurslitirnir við reyðari og svartari tekning á hvítari grund tóktust eisini sum upplagt litaval, nú Grafiski Verkstaður Føroya fór í gongd við at skipa fyri eini lit-tematiskari framsýning.

- Orsøkin til hetta er meira listarlig og grafiskt grundað, enn hon er tjaldurslig, Við tveimum teimum grafiskt sterkastu litunum er henda framsýningin av steinprentum og koparprentum sjónligt dømi um ta heilt serligu megina í grafiska tøkninum, sigur Kinna Poulsen, sum hevur valt verkini til framsýningina.

### »Sannleikin« svart uppá reytt

Kinna Poulsen vísir á, at sjálvt um litirnir eru avmarkaðir, er fjølbroytni serstakliga stórt á framsýningini, ið inniheldur verk hjá ellivu sera ymiskum listafólkum, sum øll vísa okkum teirra boð uppá grafiska sannleikan; svart og reytt uppá hvítt, ella øvugt eins og í spildurnýggja kolasvarta prentinum hjá Tóroddi Poulsen (1957) við áhugaverdu yvirlýsingini "VEGNA PLÁSSTROT Í HELVITI ER NÚ LOYVT AT ROYKJA DREKKA BANNA HORAST Á/Í HIMNI".

Frá somu óskikkiligu (h)ond kenna vit eisini aftur riðilin av ídnum, svørtum og reyðum súkklum, sum við flúgvandi ferð hava drigið føroyska myndlist fram í samtíðina, eins og eitt nýtt avbrigdi av tí kenda tostatrænum verður framsýnt, ið á sama hátt sum ta eldra tostatræið, ber surrealistiskan ávøkstur av fyltum vingløsum. Ein mynd, sum um nakað demonstrerar veruligu megina í avmarkaða, grafiskt greiða, svarta og reyða litavalinum, greiður Kinna Poulsen frá.

Hon leggur afturat, at umframt steinprent sýnir Tóroddur Poulsen hesuferð eisini fram nøkur fínlig koparprent, har hann m.a. lýsir tagnarmaskinuna, sum er afturvendandi myndevni hjá honum av eini installatiónskendari samanseting av kassum o.ø. Myndirnar eru figurativar samstundis sum tær á teirra heilt egna, serstaka hátt eru dømi um totala abstraktión.

### Himmal og helviti

Yngsta luttakandi listakvinnan er Halldis Olsen (1983), sum herfyri arbeiddi í Steinprenti við nøkrum áhugaverdum, smáum koparprentum, ið spæla sær á markinum millum naturalistiska veruleikalýsing og deformering. Huglagið er myrkt og dapurt sum í ræðuligu lýsingunum hjá Goya av krígshelvitinum, sum hann upplivdi í Spania fyrst í nítjandu øld.

Nú er nakað síðani, vit á grafiska økinum sóu nakað til Torbjørn Olsen (1956), sum í løtuni er upptikin av eini nýggjari altartalvubílegging, men Steinprent hevur í ríku goymslu sínari funnið fram eitt sera áhugavert svart og reytt altartalvuavbrigdi, sum ikki er framsýnt áður, av Tummasi, sum ivast so nógv í, at Jesus er staðin upp frá teimum deyðu, at hann kennir tørv á at stinga ein fingur í sár hansara í síðuni, fyri at fáa ítøkiligt identifikatiónsprógv, at tað veruliga er Jesus, sum stendur framman fyri honum.

Sostatt eru bæði himmal og helviti umboðað á hesi fjølbroyttu framsýningini. Lívfrøðin fær eisini sítt bæði í vøkru fuglamyndini hjá elsta listamanninum á framsýningini, Poul Janus Ipsen (1936), men eisini í áhugaverdu myndini hjá Brandi Patursson (1977), sum er grundleggjandi abstrakt við organiskum formatiónum, ið hómast sum spor av eini náttúruprosess av lívfrøðiligari skapan ella uppløysn.

Umframt verkini hjá omanfyrinevndum listafólkum verða eisini sermerkt, svørt og reyð verk at síggja hjá: Tróndi Patursson (1944), Peter Carlsen (1955), Claus Carstensen (1957), Hansinu Iversen (1966), Hanna Bjartalíð (1968) og Rannvu Kunoy (1975).



*11 listafólk eru við á framsýningini »Svart/Reytt« í Steinprent, sum Kinna Poulsen, listaummælari hevur skipað*

*Framsýningin SVART OG REYTT er opin dagliga í Steinprenti á Skálatrøð 16 í Havn frá 12. marts 2010 kl. 16:00 og ein mánaða fram. Skaldið Carl Jóhan Jensen setir framsýningina*

# Velja ársins málrøktara

**Nýggj málrøktarvirðisløn skal eggja okkum øllum til at brúka gott føroyskt mál. Virðislønin verður latin á nýásetta árliga máldegnum 25. mars**

MÁL

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Longu nú verða fyrstu málpolitisku tilmælini gjørd til veruleika. Eftir uppskoti frá Málstevnunevndini og Føroysku málnevndini hevur landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, ásett árliga Móðurmálsdagin, har ársins Málrøktari eisini verður kosin.

### Persónur ella virkið

Dagurin verður hildin á føðingardegi V. U. Hammershaimbs, 25. Mars. Hóast stundir ikki vera til at gera tað stóra burturúr degnum í ár, helt Mentamálaráðið tað hava týdning at seta hol á átakið longu nú.

Enn verður arbeitt við at leggja dagin til rættis, men longu nú er greitt, at 25. mars í ár skal vera fyrsta høvið at heiðra ein persón ella eitt virki, ið hevur verið við til at røkja og ríka føroyska málið í serligan mun.

- Vit ivast ikki í, at ein slík Málrøktarvirðisløn fer at eggja fólki til at brúka gott føroyskt mál. Eg ímyndi mær eisini, at ein málvirðisløn, sum hendan, kann skunda undir kjak um, hvat er gott mál, og kjak um málið er altíð gott, sigur Martin Næs, deildarleiðari í mentamálaráðnum.

Sum vit skilja, hevur Mentamálaráðið longu sett kikaran á ein serliga ídnan málrøktara, men meir vilja tey ikki avdúka fyribils. Bara at viðkomandi persónur ella virki er ein, vit kenna, og sum umframt heiðurin fær eina peningagávu handaða 25. mars.